# Smoltstøðin á Kalsoynni

**Sylvin Rasmussen, leiðari, sigur, at tað verður hildið aftur í framleiðsluni sum er, tí at alistøðirnar í sjónum eru varnar við at keypa sum nú er. Eisini gleðir hann seg til nýggju ferjuhavnina, sum fer at gera flutningin av oynni munandi lættari**



*1: 350 kilo av fóðuri verða nýtt um dagin á smoltstøðini, og millum annað skulu starvsfólkini kanna eftir, at fóðurinnstillingin er røtt*

ALIVINNA
*Solby A. Eliasen*

Kalsoy:
Sylvin Rasmussen sigur, at tað at alistøðirnar eru varnar við at keypa er ein avleiðing av ILA sjúkuni, sum hevur herjað alibrúkini í eina tíð nú.

- Soleiðis merkja við ILA sjúkuna, so vit hava hildið aftur í framleiðsluni nú. Vit kundu framleitt 2.5 milliónir um árið, men sum er framleiða vit umleið 2 milliónir, sigur leiðarin á smoltstøðini.

Hann vónar og væntar tó, at tað fer at verða loyvi at koppseta fiskin seinni í ár. Tað er ikki loyvt at selja laks, sum er koppsettur móti ILA í ES sum er, men Sylvin væntar, at ES fer at góðtaka tað í ár.

– Tey sum framleiða koppsetingarevni eru í øllum førum farin í gongd við at framleiða evni móti ILA, so tað má fara at seta eitt uppaftur størri trýst á ES um at góðkenna tað, heldur Sylvin.

– Tey siga, at ILA livir ikki í feskum vatni, so vit hava feskt vatn í kørunum her hjá okkum. Soleiðis verja vit okkum sum frægast í móti virussjúkuni. Eisini eru vit givnir at nýta brunnbát til flutning av oynni, tí vit meta, at hann kann føra smittu við sær, greiðir Sylvan frá.

## Dýrur flutningur

Ístaðin fyri brunnbát til flutningin nýtir smoltstøðin tyrluna, tá fiskur skal flytast av oynni.

– Vit kunnu ikki líta á til dømis Dúgvuna. Hon er her nakrar fáar ferðir um árið. Um veturin er hon kanska bert tríggjar ferðir her, og tað kunnu vit ikki brúka til nakað. Eisini, um hon ger ein túr yvir, og tað ikki viðrar, so kunnu tað ganga vikur, áðrenn hon kemur aftur. So tað er ikki ein flutningsháttur, sum vit kunnu líta á. Tí nýta vit tyrluna, hóast tað er so nógv dýrari, sigur Sylvin Rasmussen.

Hann vísir eisini á truplu støðuna við tað, at ongin kranabilur er í oynni. Tað kemur eisini av truplu flutningsviðurskiftunum. Um ein nú velur at flyta ein kranabil yvir á Kalsoynna, so veit hann ongantíð, nær hann kann fáa hann av aftur oynni, tí alt veldst um, nær Dúgvan kann koma aftur til oynna.

Sylvin greiðir frá, at tann støðan millum annað tók seg upp, tá smoltstøðin stóð í gerð. Tá skuldi sjálvsagt stórir bilar til, men tá bleiv tað koyrt saman við útbjóðingini av arbeiðinum.

– Tað stóð í útbjóðingini, at bilur mátti yvir á oynna, og teir, sum gjørdu arbeiðið, teir høvdu so egnan last og krana bil við. So tað var ikki nakar trupulleiki kortini, men tað er tað nú, um vit hava brúk fyri einum tílíkum bili, sigur Sylvin, sum sjálvandi gleðir seg saman við øllum hinum kalsoyingunum til nýggja ferjuhavnin kemur. Hon verður væntandi liðug í 2004.

– Tað fer lætta munandi um hjá øllum í oynni, tí tá verður gjørligt at flyta akfør og aðrar maskinur ímillum.

## Byrjaði í 1999

Smoltstøðin kom á várið í 1999 og á heysti sama ár fór fyrsti fiskurin á sjógv. Tað hevur verið arbeiði allatíðina síðani, og tað hevur verið regluligt.

– Í fjør varð ein nýggj høll tikin í brúk, tað var fyri at fáa størri kapasitet, greiðir Sylvin frá.

Arbeiðið á smoltstøðini fevnir um at hyggja eftir og taka deytt upp.

– Nú ljóðar tað, sum um tað doyr so nógv her, men tað ger tað slettis ikki. Men tá vit síggja okkurt, sum er deytt, so taka vit tað sjálvandi upp beinanvegin. Tað sleppur ikki at liggja, sigur Sylvin og sigur sum eitt dømi, at um tað eru 100.000 í einum kari, so verða okkurt um tíggju deyð tikin upp.

Eisini er arbeiðið hjá teimum á støðini at kanna eftir, at føðingin er rætt innstillað. Sylvin sigur, at tey fóðra okkurt um 350 kilo um dagin, og tað verður ikki mett at vera so øgiliga nógv.

Umframt hetta, so verður fiskurin eisini skildur sundur eftir stødd og koppsettur móti sjúkum á sjónum.

Og um ES seinni í ár fer at loyva sølu av fiski, sum er koppsettur móti ILA, so fer tað eisini at verða gjørt á smoltstøðini á Kalsoynni.

Tað arbeiða 9 fólk á smoltstøðini, sum liggur mitt í millum Syðradal og Húsar. Hesi arbeiða øll fast, so eru onkuntíð onnur aftur at, um tað hevur verið nógv at gera. Øll, sum arbeiða á støðini eru búsitandi á oynni.

Spurdur um, hvønn týdning støðin hevur fyri oynna, svarar Sylvin Rasmussen, at hon sjálvandi hevur havt stóran týdning, tí hon hevur skaffað arbeiðið til oynna.

– Hesi fólkini fara upp um morgunin og kunnu fara til arbeiðis uttan at skula hugsa um at fara av oynni. Og har aftur at, er hetta eisini eitt pláss, har framhaldsdeildin, sum er í Húsa og Syðradals skúla, kann koma í starvsvenjing, um tey ynskja tað. So sleppa tey eisini frá at fara av oynni, sigur Sylvin Rasmussen, leiðari á smoltstøðini á Kalsoynni at enda.



*Virksemið á smoltstøðini byrjaði á várið 1999*



*Erik Eliasen býr á Syðradali og er ein av teimum níggju, sum starvast á smoltstøðini hjá Faroe Salmon á Kalsoynni*



*Smoltstøðin liggur mitt í millum bygdirnar Syðradalur og Húsar*



Jenis av Rana:

# Torbjørn Jacobsen hevur ein trupulleika við Miðflokkinum

**- Okkara sjónarmið vekja debat í samfelagnum. Vit eru farin til arbeiðis í samgonguni, og fleiri mál eru á veg frá Miðflokkinum, sigur Jenis av Rana, sum fer at biðja um fund við Torbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkin eftir at tingmaðurin hevur lagt eftir Miðflokkinum fyri at reka víðgongdan politikk á átrúnaðarliga økinum.**



*Jenis av Rana heldur lítið um atfinningarnar móti Miðflokkinum og landsstýrismanni floksins, Bill Justinussen. Hann fer í næstu viku at biðja um fund við Torbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkin eftir atfinningarnar hjá tingmanninum móti flokkinum.*
*Savnsmynd*

SAMGONGUSTEV
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, heldur lítið um atfinningarnar hjá samgongufelagnum, tingmanninum Torbjørn Jacobsen, móti flokkinum. Í Sosialinum í gjár segði Torbjørn Jacobsen beinleiðis, at vil Miðflokkurin ikki sleppa sínum viðgongda politikki á átrúnaðarliga økinum, eigur hann at verða varpaður úr samgonguni. Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum nevnir tvey mál, har sjónarmiðini hjá Miðflokkinum eru langt frá teimum hjá Tjóðveldisflokkinum, spurningurin um fosturtøku og valið av fýra limum í Siðsemisnevndina.

– Torbjørn Jacobsen hevur ein trupulleika við Miðflokkinum, sum stavar frá fyrr í summar, tá flokkurin stuðlaði ikki ákærunum hjá Torbjørn móti løgmanni, sigur Jenis av Rana.

– Eg segði tá við Torbjørn Jacobsen, at eg stuðlaði honum, um hann legði nýggj prógv á borðið og ikki bara kom við gomlum slatri og leysum pástandum. Tað gjørdi hann ikki, og tí fekk hann ikki mín stuðul. Síðan hevur Torbjørn Jacobsen beinleiðis sagt, at tað skal koma Miðflokkinum afturumaftur, leggur Jenis av Rana afturat.

## Miðflokkurin fylgir samgonguskjalinum

Jenis av Rana vísir á, at í spurninginum um fosturtøku fylgir Miðflokkurin samgonguskjalinum. Har stendur beinleiðis, at arbeiðast skal fyri at avmarka talið av forsturtøkum. Tí heldur hann orðini hjá Torbjørn Jacobsen vera heilt burturvið.

– Eg haldi, at Torbjørn Jacobsen skal fara at finna semju í Tjóðveldisflokkinum fyrst, áðrenn hann leggur eftir Miðflokkinum, sigur Jenis av Rana.

## Rasisma

Formaðurin í Miðflokkinum heldur sera lítið um orðaskifti, sum hevur tikið seg upp, síðan landsstýrismaðurin hjá flokkinum, Bill Justinussen, valdi fýra limir í Siðsemisnevndina.

– Bill Justinussen hevur valt fýra fólk í nevndina, sum hann hevur álit á. Síðan hevur verið roynt at finna ein felagsnevndara fyri tey, og tá man heldur seg hava funnið hann, fer man í holt við at spilla tey út. Tað líkist mest av øllum rasismu, sigur Jenis av Rana. Hann heldur somuleiðis, at tingformaðurin átti at havt átalað orðaskiftinum í løgtinginum fyrr í vikuni, tá tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Anita á Fríðriksmørk, fanst hvassliga at valinum av fólki í Siðsemisnevndina.

## Ikki ein samgongutrupulleiki

Jenis av Rana metir ikki, at nógvi ágangurin móti Miðflokkinum seinastu tíðina kann tulkast sum trupulleikar í samgonguni. Hann metir har aftur ímóti, at talan er um smáting, sum tað eigur at bera til at tosa seg til rættis um. Formaðurin í Miðflokkinum fer í næstu viku at biðja um fund við Torbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkin fyri at fáa reinsa luftina.

Formaðurin í Miðflokkinum leggur als einki í orðini hjá Torbjørn Jacobsen um, at vil Miðflokkurin ikki sleppa sínum viðgongda politikki á átrúnaðarliga økinum eigur hann at verða varpaður úr samgonguni.

– Maðurin er illur. Hann kann ikki skjalprógva nøkrum av sínum pástandum, tí Miðflokkurin hevur í øllum málum fylgt tí, sum stendur í samgonguskjalinumn, sigur Jenis av Rana.

## Væntar sær ikki durafjórðingin

Jenis av Rana óttast ikki, at politikkurin hjá Miðflokkinum fer at enda við, at flokkurin verður tveittur úr samgonguni.

– Miðflokkurin er farin til arbeiðis í samgonguni. Vit vita av, at fleiri av okkara málum vekja debat í samfelagnum, men vit fara ikki at broyta okkara politikk av hesi orsøk. Flokkurin hevur ein aktivan landsstýrismann, og fleiri stórmál eru á veg frá Miðflokkinum, sigur Jenis av Rana. Hann væntar, at fundurin við Torbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkin fer at lætta um arbeiðið, og leggur afturat, at hann er ikki bangin fyri at fáa durafjórðingin frá Tjóðveldisflokkinum.

- Tí ger Tjóðveldisflokkurin tað, so kann hann sjálvur vænta at enda úti í politiska myrkrinum, sigur Jenis av Rana.

